Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

ST, avtalubrot og løgmaður

Oddagrein

NÚ er tíð at hugsa um, um vit føroyingar ikki áttu at skammast. Aðrastaðni í heiminum doyggja túsundavís av fólki í hungri eins og náttúruvanlukkur og sjúkur sum eitt nú tuberklar gera um seg. Nú vilja føroyingar – eitt av heimsins ríkastu fólkum – hava ST upp í samráðingarnar við Danmark, tí føroyingar ikki vilja loysa, um tað merkir eitt livistøði, ið framvegis hevði verið hægri enn hjá Skotlandi – okkara næsta granna fyri sunnan, ið ikki telist ímillum fátøk lond. Sum um ST ikki hevði ivaleyst um oyruni enn at tryggja eitt skandinaviskt livistøði hjá føroyingum fyri danskar pengar.

KEÐILIGT er tað, um føroyingar skulu minnast í Danmark sum teir, ið vildu loysa, men ikki vildu gjalda prísin. Trupulleikin er, at Høgni Hoydal hevur fortalt fólki og ikki minst Føroya løgmanni, at tað ber til at loysa uttan, at tað kostar nakað. Tað ber ikki til – tað er staðfest fleiri ferðir.

TAÐ, ið er meira álvarsamt, er, at nú verður ringt at fara niður at samráðast um ein frælsan felagsskap ella nakað annað við Anfinni Kallsberg sum samráðingarleiðara. Hvussu kann man fáa eitt gott samráðingarklima, tá Føroya Landsstýri gongur og ákærir donsku stjórnina fyri avtalubrot? Harmiligt er, at Anfinn Kallsberg hevur gingið so langt sum hann hevur saman við Tjóðveldisflokkinum, og enn meira harmiligt er, at eitt pressuskriv nú ger tað trupult hjá Anfinn Kallsberg at fara niður at samráðast um nakað annað enn fullveldi – kanska var hetta júst ætlanin hjá tjóðveldismonnunum við pressuskrivinum. Tað er eitt álvarsmál at rópa avtalubrot eftir einari stjórn. Løgið er, at eingin tekur sær stundir at definera »bæredygtig« og »tilstræbe« fyri Føroya Landsstýri. »Bæredygtig økonomi« merkir ikki við núverandi livistøði, tað merkir bert, at hann hvílir í sær sjálvum. Løgið er, at eitt landsstýri við so nógvum búskaparfrøðingum og løgfrøðingum skal koma út við orðum sum avtalubrot, bert tí at danir ikki vilja gjalda fyri, at føroyingar vilja hava loysing og pening í 15 ár afturat.

AFTURAT omanfyristandandi so tykist ætlanin nú at vera, at fullveldið nú skal lánifíggjast við oljuni sum pant. Um lánifígging er tað, ið samgongan vil, so kann hon fara til útlendskar bankar og orna tað. Tað tørvar okkum ikki danskarar til, men man hetta ikki vera ein viðurkenning av, at danski staturin er betri kreditorur enn týskir ella japanskir bankar?

GRUNDGEVINGIN hjá samgonguni fyri at sita á Christiansborg og biðja um danskan pening til loysingina er, at alternativið er danskar pengar í allar ævir. Hetta er ikki rætt, tað ber væl til at rappa niður við donskum stuðuli, men hetta gerst bert, sum tað sær út nú, innan fyri ríkisfelagsskapin. Tað frægasta má vera at gerast búskaparliga sjálvstøðugur við núverandi livistøði innan fyri ríkisfelagsskapin, og so, tá hetta er nátt, so kunnu Høgni Hoydal og onnur tosa um at loysa, uttan at tað kostar nakað.

Sosialurin

Viðmerking:

Samfelagið má víðari (fullveldisstríðið kvalir alt annað)

Eftir seinasta samráðingarumfarið millum landsstýrið og stjórnina kunnu vit staðfesta:

danir hava eina óbroytandi støðu viðvíkjandi skiftistíðini. framtíðarætlanir dana viðvíkjandi blokkstuðlinum er at hesin skal minka. danir tosa treyðugt við føroyingar um hernaðarmálið danir vilja bert verða við til broytingar, ið eru innanfyri núverandi ríkisrættarligu skipan.

politiskt royna danir at tekkjast ynskjunum hjá størstu føroysku andstøðuflokkunum.

Ov nógv kemur í aðru rød

Serliga eftir at hava uppliva samráðinganar so nær, sum vit sum limir í uttanlandsnevnd løgtingsins fingu høvi til undir 3. samráðingarumfarið, er mær púra greitt, at á tí mest avgerandi økinum slepst ikki víðariskiftistíðarprátið meta danir seg at vera lidnar við!!

Alt hitt, ið samráðst verður um, sæð burtur frá hernaðarspurninginum, eru smálutir, sum embætismenn eiga at kunna fáa avgreitt í friði og náðum.

Framhaldandi sokallaðar samráðingar eru beinleiðis oyðileggjandi fyri samfelagið. Eitt er alt tað, ið átti at komi í fremstu rød, men má víkja fyri fullveldisspurninginum. Hitt er tann óbeinleiðis oyðileggjandi ávirkanin, ið kjakið, sum í mongum førðum er beinleiðis óciviliseraða (¤1), hevur á fólk og samfelag.

Beinleiðis samráðingar við NATO

Viðvíkjandi hernaðarmálinum er vegurin greiðurdanir ynskja bert treyðugt at viðgera hesi viðurskifti. Tí eiga vit føroyingar at venda okkum beinleiðis til Nato høvuðsstøðina og spyrja um framtíðarætlanir teirra í Føroyum, og/ ella biðja teir um vinarligast at flyta ta upphædd, ið danir á hvørjum ári spara í gjaldi til NATO vegna virksemi teirra í Føroyum, beinleiðis til Føroyska fólkið!

Takið samanum og skrivið út fólkaatkvøðu.

Miðflokurin hevur tí hesa áheitan á Føroya landsstýri:

takið saman um tað, ið longu liggur á borðinum setið embætismenn at gera upp teir leysu endar, ið eru
fáið fólksins vegna eina avtalu við NATO
fái frá dønum krónutøl fyri ætlaða blokkstuðulin fyri komandi ár

Tá hetta er gjørt, eiga tit at leggja úrslitið fyri Føroya fólk til støðutakan skjótast gjørligt- endaliga avgerðin er jú teirra.

Vit í Miðflokkinum hava álit á, at einstaki føroyingurin, við tí andaliga grundstøði, mong hava, er førur fyri at taka røttu avgerðina (¤2).

¤ 1: eitt feskt ræðandi dømi er vikuskiftissendingin í útvarpinum fríggjakvøldið.
¤ 2: ta avgerð, ið Harri og Skapari okra ynskir.

Jenis av Rana
løgtingslimur f. Miðflokkin

Hin heilaga herferðin

Nú er orrustan av og andans hooligans kunnu leggja árarnar inn aftan á eina púra óneyðuga, ósømiliga og skammiliga herferð. Eingin fráboðað trøll komu til sjóndar á hesum sinni.

Vit eru mong, ið kunnu gleða okkum yvir at hava upplivað eina sera hátíðarliga og gleðiliga hvítusunnu, bæði í kirkju, sjónvarpi og útvarpi.

Nicolina Jensen Beder

Suðuroy og Hergeir Nielsen

Fleiri tjóðveldispolitikarar hava í nýggjari tíð fingið ein ógvuliga ódámligan vana afturat nógvum øðrum, at teir siga, at teir eru lýteleysir meðan øll onnur, sum ikki taka undir við teirra sjónarmiðum og ikki gera, sum teir siga,hava ábyrgdina av støðuni í Føroyum ídag.

Ein av hesum politikarum er Hergeir Nielsen (HN) valdur á ting í suðuroy, sum í Dimmalætting 7-6-2000 í einari ósakligari grein, sum sigur alt um, hvat maðurin stendur fyri,gevur andstøðuni og sakleysum persónum í umsitingini á SL alla ábyrgdina av tí vánaligu samferðslu, sum suðuroy hevur við meginøki ídag.

Hevði HN verði ein líka frægur politikari sum onkur annar samgongutinglimur, so hevði støðan viðvíkjandi samferðslu til Suðuroy og støðan á Suðuroyar sjúkrahúsi kanska verið ein onnur í dag.

Skrivaða orðið í samgonguskjalinum er eitt, veruleikin er eitt heilt annað. HN er hóast alt partur av verandi samgongu, men kemur bert við undanførslum, um hví hann einki ger fyri tað valdømi, hann er valdur í. Harafturat er HN nokk tann einasti suðringur sum trýr uppá landstýrismannin í samferðslumálum.

HN kemur eisini fram við tí gomlu ætlanini um ferðasamband yvir Sandoy, so at suðringar „bert" skulu brúka 4-5 tímar um at koma til miðstaðarøkið. Er tað hatta samgongan kann bjóða suðringum, so sær illa út fyri okkum,sum búgva í Suðuroy.

At eitt nýtt skip til suðuroyarsiglingina skal til, er ikki tí HN ella samgongan vil tað, men meira vegna altjóða skipskrøv.

At HN leggur eftir andstøðuni er vantandi, men at geva øðrum ábyrgdina av nøkrum, sum ein sjálvur hevur ábyrgd av, tá er mann langt úti og vísur bert máttloysi hjá HN.

Finnleif Guttesen
Tvøroyri

Takið av tilboðnum — loysið yvir 4 ár

Nú var so aftur tíðindafundur á skíggjanum. Poul Nyrup Rasmussen og Annfinn Kallsberg søgdu hvør sína søgu. Poul Nyrup Rasmussen, stinnur sum áður. Eingin broyting at hóma. 4 ára skiftistíð og dermed. Anfinn heldur at kalla tikin av ráðaloysi. Broytt uppskot broytti einki. Torført var at finna orðini.

Heilt erligt: Ikki var væntandi at Poul Nyrup Rasmussen fór at skifta støðu, tí var eisini neyðugt at koma til samráðingar við broyttum huga, men, men, men, tíverri fór tann broytti hugin skeivan veg. Í staðin fyri at taka av tilboðnum um skiftistíð uppá 4 ár, so ætla menn heldur at taka tríðja part við í samráðingarumfarið næstu ferð. Søgur ganga um at ST skal vera tað rætta.

Nei og aftur nei. Nú hava vit ein søguligan møguleika til at loysa okkum frá Danmark, og vit eiga at taka hann. Ikki í álitið á blokki ella olju ella langa skiftistíð ella Nato, men í áliti á Gud hin alt valdandi, skapara himins og jarðar. Í áliti á tann sama, sum sendi okkum fisk inn á grunnarnar tá á stóð. Hvørki føroyskir ella danskir heilar megnaðu at siga okkum, at fiskur fór at koma. Tvørturímóti, alt var svart omaná svart, men tá Guds fólk um alt landið fór í bøn hendi undurið: Fiskur kom í yvirflóð, og samfelagið lyftist upp aftur.

Farið aftur til samráðingar skjótast til ber og fáið skiftistíðina uppá pláss. Vit vita, hvat vit hava, 4 ár, men ikki hvat vit kunnu fáa - annað enn máttloysi, klandur og ótta.

Dánial á Dul Jacobsen

Tíggjunda hvør fyritøka onga umhvørvisgóðkenning

Grundleggjandi brot verða framd á lógina um umhvørvisvernd. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur ikki orku at tryggja, at lógin verður hildin

DÁNJAL HØJGAARD

Lógin er greið. Men stovnurin, ið hevur eftirlit við lógini hevur ikki manningina, ið skal tryggja, at lógin verður fylgd.

Eitt yvirlit frá heilsufrøðiligu Starvsstovu vísir, at tíggjunda hvør fyritøka í Føroyum hevur onga umhvørvisgóðkenning.

Hetta stendur at lesa í eini frágreiðing, sum Heilsufrøðiliga Starvsstova sendi landsstýrinum í november 1997. Í frágreiðingini heitir Starvsstovan á politikararnar um at fáa skil á viðurskiftunum.

Støðan er tíverri ikki broytt til tað betra síðani 1997, sigur leiðarin á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovu við Sosialin.

– Tað koma alla tíðina nýggj virki afturat, og støðan er ikki batnað síðani 1997, sigur Jákup Pauli Joensen.

Nærum 300 uttan góðkenning

Sambært yvirlitinum frá 1997 skulu 325 fyritøkur í landinum lúka lógarkravið um umhvørvisgóðkenning. Men einans 10 prosent av hesum fyritøkum - t.v.s. nakrar og 30 fyritøkur - hildu lógina.

Orsøkin er hon, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki hevur manning at tryggja, at lógin verður fylgd.

Í frágreiðingini, sum send varð landsstýrinum kærir Starvsstovan sína neyð.

»Sum støðan er, verða virki tikin í nýtslu (…) uttan at góðkenning er fingin og í fleiri førum uttan at umsókn er latin Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Sama er galdandi fyri góðkenning av broytingum/ábótum á virkjum. Manningartrotið hevur gjørt, at einki hevur verið gjørt við hesi brot á lógina. Verður ikki rættað upp uppá hetta, verður støðið tikið undan fyrisitingini av hesum parti av lógini« stendur í frágreiðingini.

Leiðarin á umhvørvisdeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovu sigur, vandi er fyri at øll virðing fyri umhvørvisverdarlógini hvørvur.

– Virðingin fyri lógini verður undirgrivin. Tað verður trupult at fáa fólk at halda aðrar partar av lógini, tá ein so grundleggjandi partur av lógini ikki verður hildin, sigur hann.

Fleiri fólk

Av tí, at arbeiðsorkan er so avmarkað hevur Starvsstovan valt, at raðfest ávísar vinnugreinar framum aðrar, tá tað ræður um umhvørvisgóðkenningar. Og seinastu árini hevur stovnurin dúvað uppá alivinnuna.

Prísurin er, at allar fyritøkur ikki hava verið javnsettar mótvegis lógini. Og tað er óheppi, viðgongur Jákup Pauli Joensen.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur í greiðum orðum – og fleiri ferðir – heitt á landsins myndugleikar, um at bera so í bandi, at lógin verður hildin.

Men higartil hevur stovnurin talað fyri deyvum oyrum.

»Tørvur er á størri arbeiðsorku, um uppgávurnar sambært umhvørvisverndarlógini skulu røkjast« staðfestir Heilusfrøðiliga Starvsstovan í frágreiðing síni frá 1997.

Starvsstovan hevur mælt til, at fleiri fólk verða sett í starv. Sum er er bert eitt fólk í starvi á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum tekur sær av at umhvørvisgóðkenna fyritøkur.

Sum eina loysn hevur eisini verið skotið upp at áseta brúkaragjøld, sum gjørt er í øðrum londum. Hetta merkir, at tey sum skulu hava umhvørvisgóðkenningar sjálvi eru við til at fíggja útreiðslurnar av hesum.

Brúkaragjøld á umhvørvisøkinum krevja eina lógarbroyting.

Í frágreiðing til landsstýrið í 1997 ávarar Heilsufrøðiliga Starvsstovan um at áliti á umhvørvisverndarlógina er í vanda

Sum støðan er, verða virkir tikin í nýtslu, sum sambært lógini áttu at havt góðkenning, uttan at góðkenning er fingin og í fleiri førum uttan at umsókn er latin Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Sama er galdandi fyri góðkenning av broytingum/ábøtum á virkjum. Manningartrotið hevur gjørt, at einki hevur verið gjørt við hesi brot á lógina. Verður ikki rættað upp uppá hetta, verður støðið tikið undan fyrisitingini av hesum parti av lógini.

Pakkaferðir sumarið 2000 www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

Danmark
DanCenter summarhús
1 vika í summarhúsi
Danland íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð
ár 12.319,- ár 11.882,-

Noreg
Pers Hotel í Gol
1 vika í summarhúsi
ár 8.905,-

Hetland
Easter-houll Chalets
1 vika í summarhúsi
ár 7.962,-

Bilferia í Europa
Weissenhäuser Strand í Norður-Týsklandi
1 vika á frítíðardepli
ár 13.335,-

Ísland
Pakkaferð
Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
ár 4.033,- fyri hvonn

Sigl & Flúgv
Sigld verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
ár 2.445,- fyri hvonn

• • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • •

e-mail: booking@smyril-line.fo